

*Hannemann kundi eins væl verið sjólátin hendan túrin við Louisu. Í 1929 gekk hann burtur við Martu. Her sæst hann saman við konuni, Honnu, og børnunum.* ***Tey eru f.v.*** *Ingrid, Mikkjal, Herman, Eli (aftanfyri), Borghild og aftanfyri hana Kissa*



*Sofus kemur til Keypmannahavnar í 1946. Aftanfyri síggjast danskur versonur, dóttirin Hjørdis og systirin Johanna, gift við Johan Restorff, kaptaininum. Børnini eru Gudrun (Haustein), dóttir Sofus og Johan Restorff á Hafnia, ommusomur Johannu*



*Ein av manningini var Harald á sjómansheiminum. Her saman við konuni Thomina*



*Sofus, sonur loðsin, var eisini ein av manningini í 1912. Í 1946 ger hann eina líknandi ferð, sum vit fara at greiða frá í eini komandi Miðviku. Her er hann saman við konuni Rosu*



*Jacob Hans Jacobsen var eisini við. Í 1952 var hann eisini eina líknandi ferð við Tusk*

vit inn aftur á Havnina.

Vit sóu bert ein enstakan mann. Tað var ein, sum hevði verið yviri á Tórgarði og vitjað gentu sína.

## Við 6 tons deksbáti

Dimmalætting hevði frásøgn um hendan túrin. Í blaðnum fyri 22. juni 1912 stendur, at "de Afstande og Vanskeligheder, man regnede med i gamle Dage, er svundne meget stærkt ind og reduceret til Ubetydeligheder; det mærker man ogsaa i disse Dage, da der tales om en Rejse herfra til Fiskeriudstillingen i København med en lille Motorbaad paa godt 6 tons. Det er den bekendte Lods Christiansen, der leder denne interessante Ekspedition; han agter at have tre unge Thorshavnere med sig, nemlig: Fiskerne Sofus og Johan Christiansen samt Montør Jacob H. Jacobsen.

Det vil vække megen Opsigt i Hovedstaden den Dag, den lille færøske Motorbaad lægger til i Københavns Havn. En saadan Rejse hører til det udsædvanlige".

Mikudagin 3. juli 1912 skrivar Dimmalætting, at "motorbaad Louise afsejlede i Lørdag Eftermiddag til København. Foruden de i Bladet førnævnte Herrer rejste Smedemester Harald Joensen, Midvaag, med Motorbaaden. Vi haaber, det gode Vejr vil holde sig, saa "Louise" kan faa en fin Rejse".

Tann 5. juli telegraferar loðsurin til Dimmalætting:

Motorbaad Louise er ankommet til København i Dag Kl. 5. Alt vel!

Christiansen.

Denne Tur er ganske usædvanlig og meget dristig. Samme Dag som den skandinaviske Fiskeri- og Motorudstilling er aabnet i København, lagde altsaa den lille færøske Motorbaad til ved Udstillingen og demonstrerede mere end noget andet, hvad Motoren kan udrette. Begivenheden maa have vakt megen Opsigt paa Udstillingen, og vi skylder Lods Christiansen og hans kække Ledsagere en Tak for deres Bedrift.

**Skifti motor**

Framsýningin man hava eydnast væl hjá føroysku luttakarunum, og tað gjørdi heimferðin hjá Louisu eisini. 27. juli 1912 skrivar Dimmalætting.

"Motorbaad Louise, Lods Christiansen, ankom hertil i Torsdags Nat kl. 12 fra København. Louise sejlede fra København Lørdag Aften Kl. 6, og har altsaa tilbagelagt Vejen paa godt 5 Døgn til trods for Modvind og daarlig Sø. Vi hilste i Gaar paa Lodsen, der var meget fornøjet med sin Københavnertur. "Man vilde bare ikke tro os dernede, da vi fortalte, vi kom sejlende fra Færøerne i den lille Baad". Louise, der paa Nedrejsen havde en gammel Motor, er nu blevet forsynet med en ny Motor af samme Slags og Kraft. Lods Christiansens raske Tur til København er et udmærket Eksempel paa de færøske Søfolks Dygtighed og Kækhed og en brillant Reklame for Gideon-Motoren".

## Tá Loðsurin róði til Klaksvíkar at fáa boð til Orknoyggjarnar

Í bók síni um Rokkin greiðir Niels Juel Arge frá um, tá ferðamannaskipið hjá DFDS "Norge" 28. juni 1904 sigldi á ein boða við Rockall og 610 fólk druknaðu. I hesi frásøgn eigur Loðsurin ein leiklut, sum lutvíst vísir hann sum ein brand, og lutvíst lýsir hetta ta ógvisligu broyting, sum er hend við samskiftismøguleikunum í farnu øld.

Tað vóru alt ov fáir bjargingarbátar til øll ferðafólkini við Norge, og var hetta orsøkin til, at so nógv druknaðu. Men fólkið á einum bjargingarbáti kom til Føroya, og um hetta skrivar Niels Juel:

Týsdagin 5. juli kemur ein norsk skonnart niðan gjøgnum Nólsoyarfjørð og kastar akker á Havnarvág. Longu tá hon kemur niðaneftir, er bátur á borði og frættir ørindini. Boð fara straks í land, og bátar kom at føra teir átjan menninar og smágentuna, sum er bjargað úr báti nr. 4 í land. Tey seks eru so illa á holdum komin, at ráðiligast er at leggja tey inn á sjúkrahúsið, so tey kunnu fáa holla viðgerð. Bátarnir fara tí inn á Vestaruvág við hesum seks og seta tey upp á land undir hospitalinum í Sjarpholinum. Hini verða førd inn á Eystaruvág og verða sett á land á Kongabrúnni. Tey fáa innivist á Hotel Djurhuus ella vertshúsinum, sum tað eisini varð nevnt. Tað stóð ikki so illa til við teimum, sum fóru á sjúkrahúsið. Nøkur teirra vórðu útskrivað longu dagin eftir og sluppu heim á Vertshúsið at gista.

Tað, sum mest ráddi um, var at boða frá, hvussu vorðið var við bjargingarbátunum. Í Føroyum vistu tey einki um vanlukkuna fyrr enn "Olga Poulina" kom á Havnina. Úr Føroyum bar ikki til at fjarrita boð niður til Hetlands ella Skotlands, tí telegrafkaðalin úr Hetlandi til Føroya varð ikki strektur fyrr enn í 1906. Einastu ráðini vóru at fáa Smiril avstað við boðunum, men hann var norðuri í Klaksvík. Hagar norður var heldur eingin telefonkaðal tá, og illa lá fyri at fáa bát norður, tí skriðan stóð eftir sjónum. Men Loðsurin (Kristian í Dali) mannaði sítt áttamannafar, Jomfrúnna, og helt út av Vestaruvág og niðan gjøgnum Nólsoyarfjørð við einum strúki av vestri. Teir komu í øllum góðum norður til Klaksvíkar og sluppu suður aftur við Smirli, sum setti inn á Havnina og tók 2. stýrimann umborð. So var farið á Tvøroyri at taka nakrar kolamolar og so til havs. Stevnt varð til Stromness á Orknoyggjunum, hagar Smiril kom fríggjadagin 8. Juli við boðunum um funna bátin.

**Ferðin hjá Sofusi**

Sofus Dal Christiansen, sonur Loðsin var havnameistari og loðsur, og hann hevur eisini verið ein ævintýrari. Hann gjørdi í 1946 eina heilt serliga ferð. Hann sigldi nevniliga við einum opnum báti til Danmarkar at vitja dóttir sína. Hendan ferðin var rættuliga dramatisk. Vit koma seinni at hava eina Miðviku um hesa ferðina.

**Komandi partur**

Sosialurin kemur ikki út komandi hósdag, skírisdag. Næsta grein í hesi røð kemur tískil um tvær vikur. Tá fara vit um umrøða Johan Christian Djurhuus, sum var kendur sum Faktorin í Klaksvík í hálva øld